


Barnaverndartænastan í Tórshavnar Kommunu søkir eftir sálarfrøðingi at byrja skjótast til ber.

**Uppgávurnar hjá sálarfrøðinginum eru m.a. at**

- veita ráðgeving og vegleiðing til sosialráðgevararnar á deildini
- gera sálarfrøðiligar kanningar og metingar av børnum og ungum
- ráðgeva og vegleiða børnum, foreldrum og øðrum, ið eru um børnini í gerandisdegnum
- veita børnum, ungum og familjum sálarfrøðiliga viðgerð
- supervisera fosturforeldur, familjustuðlar o.o.

Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og verða útintar í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á deildini og aðrar viðkomandi samstarvspartnarar, so sum skúlar, dagstovnar, døgnstovnar, Sernámsdepilin, barnapsykiatriina og Barnatænastuna.

**Søkt verður eftir einum sálarfrøðingi sum**

- er útbúgvin cand. psych. ella cand. pæd. psych. Ynskiligt er, at tú hevur autorisatión
- hevur royndir innan arbeiði við børnum, ungum og familjum
- hevur serligan áhuga í og vitan um børn og ung við psykosocialum trupulleikum
- hevur góð evni at samstarva og at arbeiða sjávstøðugt

**Vit kunnu bjóða**

- eitt áhugavert og avbjóðandi starv bæði fakliga og persónliga
- eina vælvirkandi deild har strembað verður eftir, at arbeiði verður gjørt á einum fakliga høgum støði
- møguleika fyri at menna teg fakliga

Sum sálarfrøðingur kemur tú at starvast saman við 5 sosialráðgevum, 3 skrivarum og einum leiðara umframt einum toymi við 6 familjuráðgevum. Barnaverndartænastan skal í næstum flyta í høli saman við Barna- og ungdómsdeildini, ið veitir pedagogiska og sálarfrøðiliga ráðgeving til dagstovnaranar í kommununi. Á Barna- og ungdómsdeildini starvast frammanundan ein sálarfrøðingur.

**Setanar- og lønarviðurskifti**

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

Starvið er fyribils tíðaravmarkað til eitt ár.

**Umsóknarfreist**

Umsókn við prógvi og øðrum viðkomandi skjølum skal vera Tórshavnar Kommunu, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 26. oktober 2007.

Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, leiðara á Barnaverndartænastuni, tlf. 30 20 60.

Tórshavnar kommuna

## LÆRARAR TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

Søkt verður eftir lærara at byrja 1. nov. 2007

Starvið er fulltíðarstarv, ið er sáttmálasett og tíðaravmarkað skúlaárið út.

Í Kollafjarðar skúla ganga 136 næmingar í 1. til 9. flokki.

17 lærarar at starvast í skúlanum.

Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum.

Vit arbeiða í trimum deildum við einum lærara-toymi í hvørjari deild.

Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.

Vit sóknast eftir lærara, ið kann átaka sær undirvísing í kristni í 2. og 3. flokki, føroyskum í 3. flokki, telduundirvísing í 4.-6. flokki og nakað av serundirvísing. Eisini má lærarin helst kunna átaka sær at vera telduvørður.

Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Tó kann annað fólk verða sett, um eingin lærari søkir.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, verður at senda til:

**Kollafjarðar skúla**
Botnavegur 2
FO-410 Kollafjørður

í seinasta lagi mikudagin 24. oktobur 2007 kl. 12.00.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlastjóran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á t-posti karin.hammer@skulin.fo

